# ORKUPOLITIKKUR

FYRI TÓRSHAVNAR KOMMUNU 2021-2027






Útgevari: Tórshavnar kommuna 2021
Tekningar: Gunn Sloan Müller
Uppseting: VIRKA
Prent: Føroyaprent

# INNIHALDSYVIRLIT

Innleiðing . . . . 4

Orkupolitikkur hjá Tórshavnar kommunu . . . . 6

Orkumál 2021-2027 Tórshavnar kommuna sum stovnur . . . . 10

ORKUMÁL 1 – GRØN UPPHITING . . . . 11

ORKUMÁL 2 – LED GØTULJÓS . . . . 13

ORKUMÁL 3 – EL-AKFØR . . . . 15

Borgarin og orka . . . . 18

# INNLEIÐING

Tórshavnar kommuna skal vera burðardygg og geva sítt íkast til, at altjóða Paríssáttmálin um veðurlagsbroytingar verður hildin. Tí er neyðugt við átøkum á orkuøkinum, sum skulu minka um útlátið av vakstrarhúsgassum.

Hesin orkupolitikkur setir ítøkilig mál fyri, hvussu kommunan sum stovnur kann minka um sítt útlát frá bygningum, gøtuljósum og flutningi. Harumframt setir orkupolitikkurin út í kortið, hvussu ein umlegging til varandi orkukeldur kann fara fram í kommununi sum landafrøðiligari eind, og hvussu borgararnar í kommununi eisini eru partur av hesi umlegging.



Orkuumleggingin skal byrja beinanvegin. Ein bensin- ella dieselbilur keyptur í 2020 fer sannlíkt framvegis at vera á vegunum í 2030. Ein oljufýring sett upp í 2020 fer framvegis at vera í nýtslu í 2050. Tí er umráðandi, at bæði Tórshavnar kommuna sum stovnur og borgarar ikki útvega sær nýggjar bensin- og dieselbilar ella oljufýringar, men í staðin taka avgerðir, sum minka um orkunýtslu.

Fyri at røkka orkumálunum, sum verða sett í hesum orkupolitikki, er neyðugt at gera íløgur. Býráðið skal tí samtykkja, at á leið 90 mió.kr. fram til 2027 verða brúktar á orkuøkinum.

Sum ábyrgdarfull kommuna, ið hevur tikið undir við heimsmálunum, vil Tórshavnar kommuna í samsvari við heimsmál 7, 12 og 13 taka ábyrgd av tí orkunýtslu, útláti og dálking, ið stendst av okkara virksemi, nýtslu og keypi.



# ORKUPOLITIKKUR HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU

Orkupolitikkurin er eitt stýrisamboð til at minka um útlátið av vakstrarhúsgassum hjá Tórshavnar kommunu við eini ítøkiligari ætlan fyri orkuumlegging frá olju til grønar orkukeldur.

Orkupolitikkurin tekur støði í umhvørvispolitikkinum "Grøna Leiðin" (samtyktur í býráðnum í 2016) og er ein nágreining av, hvussu Tórshavnar kommuna røkkur settu málunum, sum viðvíkja orkunýtslu. Hesi mál eru:

**Mál 1:** Allur hiti og streymur kemur frá varandi orku í 2030 (kommunan í síni heild).

**Mál 5:** Luftin skal vera rein, og akfør skulu vera umhvørvisvinarlig.

**Mál 7:** Útlátið av vakstrarhúsgassi skal vera 50% minni í 2025 enn í 2016 (kommunan sum stovnur).




Málið um, at allur streymur og hiti skal koma frá varandi orku í 2030, hongur neyvt saman við málinum hjá SEV um grønt orkuskifti. Skal málið røkkast, er ein fortreyt, at framleiðsla úr varandi orkukeldum kemur inn á orkunetið, og at farið verður burtur frá olju.

## Útinnan og eftirmeting

Hvørt ár verður uppgerð fyri orkunýtslu og $CO_2$-útlát gjørt við eini tilhoyrandi frágreiðing um, hvussu gongur við at náa settu málunum. Frágreiðingin skal umfata útlát frá kommununi sum stovni, men eisini útlát frá kommununi sum landafrøðiligari eind.

Ein orkuhagtalsskipan verður brúkt til at fáa yvirlit yvir orkunýtsluna og útlátið hjá Tórshavnar kommunu.

Býráðið hevur ábyrgdina av, at málini í orkupolitikkinum verða nádd, og Umhvørvisdeildin umsitur orkupolitikkin, sum eisini ger ársfrágreiðingar og samskipar átøkini, ið skulu fremjast.

Orkupolitikkurin fevnir um allar deildir og stovnar hjá Tórshavnar kommunu, sum eru partur av umleggingini til grøna orku.

Í 2026 verður orkupolitikkurin endurskoðaður og ætlan løgd fyri tey næstu árini fram til 2030, tá ið allur hiti og streymur skal koma frá varandi orkukeldum.

## Orkunýtslan hjá Tórshavnar kommunu

Orkupolitikkurin byggir á hagtøl fyri orkunýtslu og útlát hjá kommununi sum stovni. Hesi hagtøl eru fingin til vega sum úrslit av einum umfatandi útgreiningararbeiði.



Útlátið av $CO_2$ verður gjørt upp á hvørjum ári frá 2016, sum verður nýtt sum støðisár. Í 2016 var útlátið hjá Tórshavnar kommunu 8.915 tons $CO_2$. Gongdin higartil vísir ikki minking, men tvørturímóti eina øking í útlátinum.

Tað er tí av alstórum týdningi, at Tórshavnar kommuna setir átøk í verk, sum minka um útlátið.

Myndin niðanfyri vísir útlátið hjá Tórshavnar kommunu sum stovni í 2016, og hvussu útlátið sambært orkupolitikkinum skal skerjast niður í helvt í 2027.

Soleiðis skal $CO_2$-útlátið hjá Tórshavnar kommunu minkast 50%.

**$CO_2$-útlát 8.915 tons frá orkunýtslu hjá Tórshavnar kommunu í 2016**




**$CO_2$-útlát 4.450 tonsfrá orkunýtslu hjá Tórshavnar kommunu í 2027**





# ORKUMÁL 2021-2027 TÓRSHAVNAR KOMMUNA SUM STOVNUR

Kjarnin í orkupolitikkinum eru tey trý orkumálini:

Orkumál 1 – Grøn upphiting
Orkumál 2 – LED-gøtuljós
Orkumál 3 – El-akfør

Orkumálini eru øll fyri kommununa sum stovn og eru avgerandi fyri at røkka máli 7 í Grønu Leiðini, ið sigur at $CO_2$-útlátið frá kommununi sum stovni skal vera 50% lægri í 2025 enn í 2016. Náttúru- og umhvørvisnevndin samtykti tó 30. november 2020 at leingja áramálið til 2027.

Orkumálini snúgva seg í stóran mun um útskifting av útbúnaði og hanga tí neyvt saman við, at peningur verður settur av til økið. Hóast átøkini krevja fígging, verður nógv at spara í longdini.

### $CO_2$-útlát frá orkunýtslu hjá Tórshavnar kommunu í 2016



# ORKUMÁL 1 – GRØN UPPHITING

Upphiting og streymnýtsla í bygningum umboða meira enn helmingin av samlaða $CO_2$-útlátinum hjá Tórshavnar kommunu sum stovni.

Síðan 2016 eru 11 bygningar lagdir um frá oljufýring til fjarhita og hitapumpur, og aðrir hava fingið partvíst grøna orku. Harumframt hava nýggir bygningar fingið fjarhita. Framvegis hava á leið 100 av 175 bygningum oljufýring.

Síðan 2016 eru 13% (14.000 m2) av oljufýrdari gólvvídd løgd um til grøna orku.

2016 13% 2027

**ORKUMÁL 1:
ALLAR OLJUFÝRINGAR HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU ERU BURTUR Í 2027**

Farast skal frá útbúnaði, ið nýtir fossilar orkukeldur, til útbúnað, ið nýtir grønar orkukeldur. Øll oljufýr verða skift út til hitapumpur og fjarhita, soleiðis at grøn orka hitar allar bygningar í 2027. Hetta merkir, at hvørt ár skulu á leið 17 oljufýringar skiftast til grøna orku.

Nýggj oljufýr verða ikki sett upp frá 2021.

Tá ið øll oljufýr eru burtur, minkar árliga $CO_2$-útlátið frá bygningum á leið 2.600 tons.

### Orkunýtslan í bygningum skal minka

Orkunýtslan skal eisini minka við at gagnnýta orku betur og við at broyta atferð. Bjálving skal verða gjørd í sambandi við viðlíkahald og endurnýggjan,

og veggir, vindeygu, hurðar o.a. skulu hava lítið hitatap. Útbúnaður skal skiftast við orkubetri útbúnað, so sum ljós-, luftskiftis- og hitaútbúnað. Inniumhvørvið í bygningum gerst samstundis betur við tílíkum orkuátøkum.

Nýggir bygningar, so sum skúlar, dagstovnar, ellisheim, skulu byggj¬ast við lítlari orkunýtslu í hyggju. Lítil orkunýtsla skal hugs-ast inn í byggiverkætlanir heilt frá byrjan og skal vera gjøgnumgangandi partur av útbjóðingartilfarinum.

Sólkyknur verða settar á egnaðar tekjur á bygningum hjá Tórshavnar kommunu, soleiðis at flestu bygningar kunnu framleiða ein part av egnari orkunýtslu við grønari orku. Strembast skal eftir, at nýggir bygningar verða settir soleiðis, at tekjur og møguligar flatur kunnu nýtast til sólkyknur. Dagsljós og sólarhiti skal gagnnýtast í størstan mun, tó uttan at ljósið og hitin gerast ov nógv.



# ORKUMÁL 2 – LED GØTULJÓS

Gøtuljósini nýta á leið 2 mió. kWh av el um ári og umboða 8% av samlaða $CO_2$-útlátinum hjá Tórshavnar kommunu. Um gøtuljós nýta LED-ljós, minkar elnýtslan á leið ein triðing.

Síðan 2011 eru á leið 2.000 gøtuljós skift til LED-gøtuljós, sum er 23% av øllum gøtuljósunum í Tórshavnar kommunu.

2016 23% 2027

**ORKUMÁL 2:**
**ØLL GØTULJÓS SKULU VERA SKIFT TIL LED Í 2027**

Farast skal frá ljóskeldum, sum nýta nógva orku, til útbúnað við LED og ljósstýring, ið gagnnýtir elorkuna munandi betur.

Ferðin á útskiftingini til LED skal økjast, so at øll gøtuljósini brúka LED í 2027. Hetta merkir, at hvørt ár skulu á leið 1.100 gøtuljós skiftast til LED.

Útskiftingin verður gjørd í samsvari við gulu ætlanina hjá Tórshavnar kommunu, ið er ein ljósætlan, hvørs endamál er orkusparing, standardisering og estetikkur av gøtuljósum.

Tá ið øll gøtuljósini eru skift, minkar árliga $CO_2$-útlátið á leið 500 tons.

### Stjørnuklárt

Nú stórthundrað ár eftir, at ravmagnið á fyrsta sinni kom til Havnar í 1901, verða vegir og gøtur upplýst av íalt 9.000 gøtuljósum. So hvørt sum kommunan veksur, við fleiri vegum og búsetingum, verða alsamt fleiri økir lýst upp við gøtuljósum, ljósskiltum o.ø. Ljósdálking er tí eisini eitt fyribrigdi, sum ger meira um seg.

Ljósið ávirkar og órógvar bæði menniskju og djóralív, og fyrilit skal hava fyri, at náttarljósið ikki gerst ov nógv. Serlig náttúruøki skulu vera heilt myrk um náttina, og gøtur, har t.d. súkklur ferðast, skulu hava rørslufølarar, so at einans tey ljósini tendra, sum eru neyðug, tá ið fólk ferðast har. Færri gøtuljós og minni ljósstyrki ger eisini orkunýtsluna minni.



# ORKUMÁL 3 – EL-AKFØR

Bilar og maskinur umboða 11% av samlaða $CO_2$-útlátinum hjá Tórshavnar kommunu.

Kommunan hevur gjørt sær góðar royndir við elbilum, og menningin hevur verið sera stór innan fyri elbilar seinastu fáu árini. Battaríini í elbilum eru nú so stór, at elbilarnir kunnu koyra langt og nøkta tørvin í flestu førum. Tørvur er tískil ikki longur á bensin- og dieselbilum.

Tórshavnar kommuna hevur á leið 80-100 persón- og vørubilar, sum skulu útskiftast til el-akfør, og í 2020 vóru 9 elbilar.

2016 9% 2027

**ORKUMÁL 3:**
**ALLIR PERSÓN- OG VØRUBILAR HJÁ TK VERA ELRIKNIR Í 2027**

Farast skal frá bilum, ið nýta fossilar orkukeldur, til bilar, ið gagnnýta orkuna munandi betur og nýta el. Frá 2020 verða bert elbilar og elvøruvognar keyptir; ongir bensin- ella dieselbilar verða keyptir. Hvørt ár skulu á leið 15 bilar hjá kommununi skiftast til elbilar.

Skiftið til el-akfør merkir eisini, at løðistøðir skulu setast upp við kommunalar bygningar, har tørvur er at løða.

Tá ið allir persón- og vørubilar eru skiftir, minkar árliga $CO_2$-útlátið á leið 140 tons.

### Grønir ferðslumøguleikar

Lastbilar og maskinur umboða størsta partin av útlátinum frá akførum hjá kommununi. Tá ið ein maskina ella stórur bilur skal skiftast út ella útvegast, skal kannast eftir, um ein elrikin ella vetnisrikin útgáva finst, sum kann nøkta tørvin.

Grønar loysnir verða valdar fram um aðrar, og í útboðum telur við, um und-irveitarin hevur grønar maskinur, sum t.d. ruskinnsavningin, har orkunýtslan, útlátið og óljóðið høvdu verið munandi minni.

Tórshavnar kommuna fer eisini at virka fyri, at grønu ferðslumøguleikarnir hjá starvsfólkum gerast alsamt betri. Tað skal vera høgligari at ganga og súkkla, og Bussleiðin skal eisini nýtast fram um ferðing við bili.



Ferðsluvarðin vísir, hvussu raðfestast skal viðvíkjandi ferðing til og frá arbeiði umframt ferðing í arbeiði, tá ið vit hugsa um orkunýtslu.

Starvsfólkasúkklur skulu vera tøkar hjá starvsfólkum hjá Tórshavnar kommunu.

Flogferðslan elvir til eitt stórt og vaksandi útlát av $CO_2$. Talið á flogferðum hjá Tórshavnar kommunu skal minka, og samskift verður gjøgnum internetið, tá ið tað er møguligt. Útlátið frá flogferðum skal verða endurbøtt við átøkum, ið binda eins nógv útlát, sum ferðin er orsøk til.

Ganga, súkkla, buss, bil, flúgva. Heimaarbeiðspláss



# BORGARIN OG ORKA

Ein umlegging til reinari orkukeldur ger býin grønari og minkar um orkuútreiðslur, luftdálking og útlát av vakstrarhúsgassum.

Við m.a. upplýsing á heimasíðuni og ymiskum tiltøkum skal Tórshavnar kommuna eggja borgarum og vinnu at minka um orkunýtsluna.

### Grønar orkuloysnir til hús

Borgarin skal komandi árini skifta oljufýr út til grøna orku, og kommunan skal kunna og vegleiða um bjálving og orkurættan útbúnað.

Fyri at fleiri skulu hava møguleika at fáa jarðhita, skal tað vera møguligt, at tvey ella fleiri húski eru saman um jarðhitahol.

Tórshavnar kommuna skal virka fyri, at eingir nýggir oljutangar verða settir upp í kommununi frá 2022. Oljunýtsla elvir bæði til útlát av vakstrarhúsgassi og dálkar eisini illa, t.d. tá ið leki er frá oljutangum. Serliga eru tað niðurgrivnir oljutangar, ið við tíðini hol terist á. Oljan seyrar í jørðina, dálkar ognir hjá eigarum og grannum og rennur út í áir.



### Grøn ferðsla

Tað skal vera lætt at ferðast grønari til arbeiðspláss, handlar, skúlar o.a. við at ganga, súkkla, koyra í bussi ella skifta til elbilar. Við skiftinum til bilar uttan lokalt útlát gerst luftgóðskan í býnum eisini betri.

Bátar skulu eggjast til at nýta reinari orku, og krøv verða sett.

Súkkluskýli verða sett upp eins og almennar løðistøðir til elbilar. Fyri at geva býnum eitt grønari yvirbrá skulu parkeringsøkir til elbilar og súkklur í minni mun vera úr asfalti, men við grasvøkstri. Grøn øki minka eisini um nøgdina av regnvatni, ið endar í kloakkunum.

### Bussleiðin

Tórshavnar kommuna skal virka fyri, at Bussleiðin verður rikin við bussum, ið ikki nýta fossilar orkukeldur. Tað verða ikki fleiri dieselbussar settir í rakstur, men nýggir bussar skulu vera riknir við el.
Bussleiðin skal koyra fleiri túrar og skipast soleiðis, at hon minkar enn meira um bilaferðsluna.

### Skúlar

Orka skal inn á skúlarnar, og gerast skal frálærutilfar um orkunýtslu. Upplýsast skal um góðar orkuvanar í skúlum, og við kunningarátøkum um orkunýtslu og tilfeingisnýtslu verða skúlanæmingar stuðlaðir í at hava ein góðan orkuatburð.





TÓRSHAVNAR
KOMMUNA